# Teir vóru fittari enn vanligt



Bólkurin Páll Finnur Páll plagar ikki at leggja fingrarnar ímillum, tá ið teir skriva sangir. Teir plaga at arga fólk við óskikkiligum tekstum – ja, summi vildu helst sagt ónærisligum – og ein av teimum er at finna á útgávuni Livandi tónleikur. Tann sangurin kallast Blottarir, og hevði neyvan verið borðbærur til hesa publikatión.

Til Prixið var Páll Finnur Páll á eini meira varisligari kós, tá ið tað ráddi um orðini.

Men hvat varð so av teimum illavorðnum sangunum?

– Vit hildu ikki, at tað tænti nøkrum endamálið at spæla teir til Prixið, tí teir kundu bara øst dómarar og fólk meira enn neyðugt var, sigur Finnur Jensen, sum er annar av forsangaranum í bólkinum.

Men hava tit so slept hesum sangum?

– Nei, tað hava vit ikki. Har eru fleiri av slagnum við á útgávuni hjá okkum, sum kemur í summar.

## Stjórin til Prixið



Stjórin í Norðurlandahúsinum, Helga Hjørvar, var millum gestirnar til Prixið leygarkvøldið. Norðurlandahúsið í Føroyum spælir ein týðandi leiklut í Prix Føroyum – ikki minst tá ið talan er um fyrireiking og fíggjarligt grundarlag.

Tað var eitt hugskot um at gera eitt tónleikatiltak fyri ung, sum í 1995 endaði við, at Prix Føroyar varð hildið á fyrsta sinni.

Hetta er fimta ferðin, at kappingin verður hildin, og Norðurlandahúsið hevur øll árini brúkt nógva orku til kappingina.

## Ove hevði yvirblikkið



Tónleikastjórin í Útvarpinum var til arbeiðis í Fuglafirði leygarkvøldið. Ove Olsen sat í produsarastólinum í bussinum hjá Útvarpinum, og tað var hansara uppgáva at hava yvirblikk yvir tað, sum fór fram á pallinum.

Vanliga er tað Edvard Nyholm Debess, sum hevur hendan leiklutin, men honum barst frá hetta vikuskiftið, og so var tað tónleikastjórin sjálvur, sum tók yvir.

Uppgávan hjá produsaranum er at samaskipa arbeiðið hjá útvarpsfólkunum á staðnum. Útvarpið sendir allar framførslurnar í innleiðandi umførunum beinleiðis, og harafturat eru reportarar og vertir eisini til arbeiðis, so tað er nógv, sum skal fáast at passa saman.

Útvarpið fer aftur hesaferð at gera eina fløgu, har allir finalubólkarnir hava ein ella fleiri sang við, men vanliga verða hesir sangir tiknir upp til sjálva finaluna.

## Nógv peikaðu á Chain



Tá ið Útvarpið spurdi seg fyri um, hvør bólkur átti at vinna umfarið leygarkvøldið, vóru tað nógvir áhoyrarar, sum peikaðu á gospelbólkin Chain úr Klaksvík.

Ungu menninir í Chain høvdu havt eina góð framførslu, men tá ið dómurin kom, vóru tveir aðrir bólkar sendir víðari í kappingini.

Chain hevur sløk fimm ár á baki, og teir hava spælt til onkur tiltøk hesi árini. Eftir luttøkuna í Prixnum er lítið at ivast í, at boð nú verða oftari eftir bólkinum.

Teir, sum spæla í Chain, eru: Hans Andrias Olsen, Leivur Vitalis, Jógvan Fróðin Baldvinsson, Eyðun Thorgeirsson og Alvin Ellebye Andersen.

## Mikkjal ynskti tillukku

Sangarin í rockbólkinum Krit, Mikkjal Gaard Hansen, var í góðum hýri, tá ið vinnarin av Prixnum var funnin. Manningarnar í Krit og Makrel hava sterk vinabond, og tí var Mikkjal skjótur at ynskja Rasmusi Rasmussen og hinum í bólkinum til lukku við sigrinum.



Krit hevði eina góða framførslu í næstseinasta umfari, men bólkurin kom ikki víðari í kappingini, og tað vóru summi fólk misnøgd við. Tí var Mikkjal fegin um, at vinmenninir í Makrel komu víðari.

Tá ið Makrel fór á pallin fyri at geva eitt eykanummar, var sangarin í Krit eisini boðin upp á pallin. Ári Rouch og Mikkjal Gaard Hansen sungu ein sang, sum Makrel og Krit hava gjørt í felag.

## Enn ein kvinna á odda



Gospelbólkurin MMM er næsti bólkurin í hesi Prix-kappingini, sum hevur kvinnuligan forsangara.

Í triðja umfari var Olivia Mikkelsen á odda fyri bólkinum Mary's Baby, og hesaferð sang Alice Garðalíð í bólkinum MMM. Harafturat sungu tvær ungar kvinnur kór hjá Side Effect.

Kvinnurnar eru sera fáar í tali til Prix Føroyar kappingina, meðan tær hinvegin flokkast um kappingar sum Ársins Songrødd og Barnaprixið.

Í fimta og seinasta innleiðandi umfarin í Prixnum, sum verður hildið um 12 dagar, verður eingin kvinna á pallinum. Sambært almennu upplýsingunum, sum bólkarnir hava latið Prixleiðsluni, verða tað 25 mans í teimum seks bólkunum, sum fara at spæla.

Tað telir kanska rætta vegin, at managerin hjá rockbólkinum Týr er ein kvinna, nevnliga Sigrid J. Dalsgaard.



VÍF-Neistin 36-25 (16-12):

# Neistin er úti



*Vestmenningar lótu ongan iva vera eftir, tá teir so dyggiliga settu Neistan uttan fyri ávirkan í FM-spurninginum*

**Neistin varð rætt og slett bankað ígjøgnum av einum væl uppløgdum VÍF-liði, og nú er tað ein staðfesting, at FM-stríðið stendur millum VÍF og StÍF**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir heldur laku úrtøkuna fyrstu dystirnar í endaspælinum mátti røkka ella støkka hjá Neistnaum, tá teir sunnudagin vitjaðu í Vestmanna. Skuldi liðið framvegis gera sær vónir um eitt pláss heilt uppi á ovastu rók, so mátti dysturin í Vestmanna vinnast. Nakað sum Neistin annars ikki hevur megnað síðani FM-gullið í 2000.

### Skotstyrkin hjá Áka

Fyrstu løtuna av dystinum var eisini líkt til, at Neistin kanska kundi hava ein møguleika at gera okkurt við VÍF. Tó at Eli Müller heilt skjótt byrjaði at prógva, at hann eigur at roknast millum allar fremstu málverjarnar í landinum, so var tað Neistin, sum setti kósina fyrstu minuttirnar, men tað helt tó ikki leingi.

VÍF fekk spakuliga verjuna upp á pláss, og tá teir so um miðjan fyrra hálvleik sendu Áka Olsen inn á vøllin, mundi skjótt vera greitt, at nú liðugt hjá Neistanum. Áki hevur verið illa plágaður av skaðum seinnu árini, og ikki minst mundi tað taka fast, at hann trýsti seg sjálvan at spæla landsdystirnar herfyri, og tí hevur leiklutur hansara fyri VÍF verið nakað avmarkaður í endaspælinum.

Sunudagin tó skjótt, at hann staðfesti sítt virði. Kanska er hann ikki kvikasti maður og vøllinum, og kanska heldur ikki tann, sum er lættastur á sær, men tá tað kemur til skotstyrki, er eingin í nær námind av Áka Olsen. Zeljko Jotic hevði annars fram til tá verið væl viðvirkandi til, at Neistin helt fast um leiðsluna, men skotstyrkina hjá Áka fekk hann so einki gjørt við. Eftir tríggjar minuttir á vøllinum hevði Áki steinað bóltin tríggjar ferðir í kassan, og tó at Neistin legði nógv fyri í royndunum at skipa verjuspælið betri, so fingu teir ongan tíð takið.

### Trýstið avgerðandi

Eftir hetta var tað nevnliga alla tíðina so, at VÍF hevði mest sum tamarhald á dystinum. Í ein hálvan tíma vaks munurin einki serligt, men hinvegin kom Neistin ongan tíð nærri. Hetta seinasta komst ikki minst av, at vestmenningar alla tíðina løgdu eitt støðugt trýst á neistaverjuna. Denturin varð alla tíðina lagdur á – eisini tá Neistin hevði skorað - at koma skjótt niðan, soleiðis at verjan ongan tíð fekk nóg góðar stundir at skipa seg, og tað var sjónligt, at hetta als ikki hóvaði Neistanum.

Og tá einir tíggju minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki, so hoyknaðu teir bláu eisini undan trýstinum. VÍF skoringarnar gjørdust alsamt títtari, og tað tóktist vera fullkomuliga líka mikið, hvat Neistin royndi at gera. Sjálvt jugoslaviski málverjin gav at enda skarvin yvir, soleiðis at ungi Pauli Holm Petersen kundi fáa sær nakrar royndir í málinum, men fyri tað mesta gingu hesar út upp á at taka bóltin úr meskunum.

### Munur kom í

Við sigrinum staðfestu vestmenningarnir fyrst og fremst, at teir so sanniliga ikki ætla sær at lata føroysku hondbóltstrúnuna frá sær uttan víðari. Tað var sum so kanska heldur ikki væntandi, men fyri tað nógva hevur spælið frá teirra síðu verið sera misjavnt í ár.

Tað verður tað kanska eisini komandi umførini, men megna teir bara so dánt at halda fast um spælið frá sunnudegnum, so skal nakað væl meira enn stórspæl til frá hinum liðunum, um tey skulu standa VÍF kurl. Ivaleyst er tað bara StÍF, sum megnar at spæla við, tá ferðin verður lyft somikið høgt, sum hon varð tað hesaferð, og so skal heldur ikki gloymast avrikið í verjupartinum. Ella rættari málverjapartinum. Eli Müller hevur í árinum havt sínar trupulleikar við skaðum, og hevur tí ikki verið í neyðugu venjingarstøðuni, men nú tykist hann aftur nærkast toppinum. Kanska eru tað ikki tær mest ótrúligu bjargingarnar, sum hann finnur fram, men tað eru fáir málverjar, sum lesa spælið eins væl, og tí hevur hann sjáldan tørv á tí spektakulera.

Hjá Neistanum var talan hinvegin um eitt farvæl til FM-stríðið, og sum endaspælið hevur lagað seg, so er spurningurin kanska eisini, hvørt teir bláu yvir høvur megna at vinna bronsumerki. Tað setir so aftur spurningin, hvørt topp-plaseringin í grundspælinum var grundað á egnar dygdir, ella á veikleikar hjá øðrum liðum. Neistin var í øllum førum ikki liðið, sum mest varð tosað um, tá møguligir oddakandidatar skuldu nevnast undan kappingarárinum, og møguliga hevur liðið leikt yvir evni alt grundspælið.

Enn er tó ikki alt mist hjá teimum bláu. Teir halda framvegis fast um bronsuplássið, men nú fer av álvara at sansa at, og við dystum móti ávíkavist StÍF og Kyndli fyri framman, verður í øllum førum torført at halda fast um verandi støðuna.

### Dysturin í tølum

VÍF-Neistin 36-25 (16-12)

Málskjúttar:

VÍF: Áki Olsen 15 (1), Ólavur Brimnes 6, John Zachariasen 5, Ingi Olsen 5 (2), Petur Frank Joensen 4, Áki G. Olsen 1

Neistin: Ragnar Stakksund 6, Áki Mørk 5 (3), Helgi Michelsen 5 (2), Dann Thorleifsson 3, Kári Mortensen 2, Ræni Slættanes 2, Birgir KAss 1, Morgan Knezevic 1

Brotskøst: VÍF 5, Neistin 7

Útvísingar: VÍF 6, Neistin 4

Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen. Løgdu alt fyri eitt eina harða linju, og hóast smávegis mistøk altíð kunnu finnast, so var tað positivt at síggja, hvussu togan og kjaftaslit varð revsað uttan stórvegis roks.